

eisini førast út í lívið. Onki við at ganga og hugsa og hugsa, og so verður tað kortini ikki til nakað, sigur hann avgjørdur.

Hetta gjørdi so eisini tað, at Trølla ungin sá dagsins ljós, at filmarnir komu, at Jógvan Politimeistari og Erling politistur komu við. Og tað steðgar heldur ikki har. Emil greiðir frá, at teir hava nógvar fantasiir um, hvat kann gerast víðari, men okkurt av tí er sjálvandi sera krevjandi, um teir skulu føra tað út í lívið.

– Tað má vera realistiskt, sjálvandi. Eg trúgvi, at sum støðan er í dag, so er Trølla omman komin fyri at verða. Tað leggjast nýggj børn til allatíðina, og øll elska hana – næstan øll, sigur Emil og sipar til tey børnini, sum hava hug at ræðast øgiligu trøllini.

Hann sigur, at tey, sum ræðast, ræðast øgiliga illa og gráta nógv. Tað løgna er kanska, at tað eru mest dreingir, sum ræðast Trølla Pætur og ommuna.

## Vaksin eisini

Tað er ongin loyna, at vaksin eisini hava hug at flenna nógv at teimum báðum kendu trøllunum. Emil sigur, at tá hann kemur til tiltøk, so plagar hann at geva sær far um, hvør er tilstaðar. Um tað eru bara børn ella eisini nógv vaksin. Á henda hátt kann hann geva øllum eitt sindur.

Á einari av sínum vitjanum, býtti hann Twix út til børnini. Meðan hann býtti út, rópti hann, at omma hevði sjálv bakað. Hetta er bert nakað spontant, sum kemur frá honum, og als ikki nakað, sum hann tilvitað hevur hugsað um, áðrenn hann kemur á vitjan.

Trølla Pætur og omman vórðu eisini umbiðin til fleiri jólafrokostar í fjør. Teir vóru til jólafrokostin hjá Shell, og har høvdu teir gjørt eina videoupptøku, har omman rokast við at skifta eitt oljufýr. Hetta gongur sjálvandi galið, og alt brestir.

– Vit royna at gera skemt og undirhald, sum passar til tey, ið eru tilstaðar, greiðir Emil frá og heldur fram, at longu nú eru Trølla Pætur og omman umbiðin til jólafrokostar í ár.

## Seinasta omman

Hetta er annars ikki fyrstu ferð, at Emil Gunnarstein spælir omma. Tá Gjáaromman hjá bólkinum Dynamitt, sum bæði Emil og Niclas Heri vóru við í, kom fram, fekk Emil eisini leiklutin sum omman í sjónbandalagnum.

Mong munnu minnast Niclas og ommuna, sum fóru umborð á Norrønu, tí tey skuldu til Gardarsjógvin – og ikki komu langa leið, tí omman bleiv ov full og datt av í barrini.

Tá vóru tað tveir nakað yngri menn, sum fingust við tónleik, ið myndaðu leiklutirnar.

Emil greiðir frá, at Niclas Heri skrivaði sangin um Gjáarommuna, meðan teir gingu í fólkaskúlanum. Tá Dynamitt so skuldi geva teirra fyrsta band út, manglaðu teir ein sang. Teir gjørdu so av at koyra Gjáarommuna sum triðja ella fjórða sang á B síðuni, tí honum væntaðu teir sær als onki av. Men Gjáaromman bleiv ein av størstu landaplágunum í áttatiárunum. Tað bandið kom út í 1986.

Emil sigur, at nú er nóg mikið. Hann væntar, at Trøllaomman hevur langa tíð fyri framman, tí tað tykist bara sum at hon gerst betri og betri umtókt.

– Men hetta er tann seinasta. Eg hevði ikki orkað ella tímað at byrja aftur av nýggjum, um vit steðgaðu við hesum . Tað er heilt vist, sigur Emil Gunnarstein, meðan hann roynir at fáa hárið á Trøllaommuni at síggja so frísut út sum gjørligt til æru fyri myndamannin.